# Einkultstartur í Sundalagnum

Sunnudagin verður súkklað um kapp á einkultstarti, sum er 40 kilometrar. Byrjað verður á víkiplássinum við Kirkjuna í Kollafirði, og súkklað verður til rundkoyringina við Streymin og aftur. Eisini verður skipað fyri einkultstarti fyri motionistar, og venda hesi við Áir.



# Tvey nýggj í HSF-nevndina

Hondbóltssambandið hevði aðalfund leygardagin, og har vórðu tveir nýggir nevndarlimir valdir. Anya Midjord og Leivur Mikkelsen bóru seg bæði undan afturvali, og í terirra stað vórðu vald Jón Kragesteen og Margrið Weihe. Hinir nevndarlimirnir eru Kristian Johansen, sum framvegis er formaður, Eina Gudmundsen og Sigvør Matras. Tiltakslimir eru Kára á Dunga og Eydna Mikkelsen.



*Tað standur ofta nógv á ítróttarfólkunum, so nógv kann vinnast við góðari fyrireiking*

# Fyrilestrar um Oyggja-leikir

**ÍSF hevur boðið øllum teimum, sum taka lut á oyggjaleikum, til fund í Norðurlandahúsinum í kvøld**

OYGGJALEIKIR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er um felags fyrireiking til leikirnar, har mongu føroysku ítróttarfólkini sjálvandi vilja gera sítt til, at føroyska úrtøkan verður tann best møguliga.

Evnini á fundinum í kvøld eru venjing, kostur og doping, og verða tríggir fyrilestrar upp á einar 20 minuttir hvør á skránni.

Fyrilestrarhaldarar eru Magni Mohr, ítróttarfysiologur, Sølvi Winther Olsen, ítróttarlækni og Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðsluráðgevi.

Fundurin byrjar klokkan 19, og millum fyrilestrarnar verður sjálvandi høvið hjá luttakarunum at seta spurningar til serfrøðingarnar.

# Gullið kann takast leygardagin



*Fagnaðurin var ovurstórur, tá Michael Carrick bara fýra minuttir fyri leiklok rættaði gullkósina hjá Manchester United. Nú er ein javnleikur móti Arsenal leygardagin nóg mikið til at vinna Premier League fyri 11. ferð*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Fyri bara aðru ferð kann Alex Ferguson fegnast um møguleikan at vinna gull á heimavølli í Manchester**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sir Alex Ferguson hevur roynt tað tíggju ferðir áður. Tað sama hevur Ryan Giggs. Men bert eina ferð hava teir báðir verið við til at tryggja sær gullið á heimavølli á einum fullsettum Old Trafford.

Níggju av teimum tíggju ferðunum, sum Manchester United hevur vunnið gull í Premier League, hevur tað nevnliga verið á útivølli, at gullið er tryggjað. Men leygardagin ber aftur til.

Manchester United megnaði nevnliga at venda hóttandi tapi til sigur í útidystinum móti Wigan í gjár.

## Gylti Tevez

Fyri steðgin sá annars ikki nakað serligt út. Hugo Rodalliga legði nevnliga vertirnar á odda fyri steðgin, og tað var sum heild lítið, sum bendi á, at gestirnir skuldu venda hesum.

Stve Bruce, sum í dag er venjari hjá Wigan, átti sín avgerandi leiklut í fleiri teimum fyrstu Premier League heitunum hjá Manchester United. Og tí veit hann betur enn tey flestu, at reyðu devlarnir ikki geva seg uttan víðari. Og tað gjørdu teir heldur ikki hesaferð.

Carlos Tevez, sum alt meira sannlíkt fer til annað felag í summar, varð skiftur inn, og hann javnaði til 1-1 við einum framúrskrandi máli, sum hann skoraði við hælinum.

Og bara fýra minuttir fyri leiklok varð fagnaðurin ovurstórur, tá Michael Carrick langaði bóltin í netið til 2-1.

Sigurin ber við sær, at Manchester United nú bert skal hava eitt stig í trimum teimum seinastu dystunum. Og fyrsti møguleikin til hetta er altso leygardagin, tá Arsenal kemur á vitjan á Old Trafford.

**Premier League**

| | | | | | | | | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v | - | j | - | t | | | | |
| 1 | Man Utd | 36 | 27 | - | 5 | - | 4 | 67 | 24 | 43 | 86 |
| 2 | Liverpool | 36 | 23 | - | 11 | - | 2 | 72 | 26 | 46 | 80 |
| 3 | Chelsea | 36 | 23 | - | 8 | - | 5 | 63 | 22 | 41 | 77 |
| 4 | Arsenal | 36 | 19 | - | 11 | - | 6 | 64 | 36 | 28 | 68 |
| 5 | Aston Villa | 36 | 16 | - | 10 | - | 10 | 52 | 47 | 5 | 58 |
| 6 | Everton | 36 | 15 | - | 12 | - | 9 | 50 | 36 | 14 | 57 |
| 7 | Fulham | 36 | 13 | - | 11 | - | 12 | 38 | 32 | 6 | 50 |
| 8 | Tottenham | 36 | 13 | - | 9 | - | 14 | 42 | 41 | 1 | 48 |
| 9 | West Ham | 36 | 13 | - | 9 | - | 14 | 39 | 41 | -2 | 48 |
| 10 | Man City | 36 | 14 | - | 5 | - | 17 | 56 | 48 | 8 | 47 |
| 11 | Wigan | 36 | 11 | - | 9 | - | 16 | 33 | 43 | -10 | 42 |
| 12 | Stoke | 36 | 11 | - | 9 | - | 16 | 35 | 51 | -16 | 42 |
| 13 | Bolton | 36 | 11 | - | 7 | - | 18 | 40 | 51 | -11 | 40 |
| 14 | Blackburn | 36 | 10 | - | 10 | - | 16 | 40 | 58 | -18 | 40 |
| 15 | Portsmouth | 36 | 9 | - | 11 | - | 16 | 35 | 55 | -20 | 38 |
| 16 | Sunderland | 36 | 9 | - | 9 | - | 18 | 31 | 48 | -17 | 36 |
| 17 | Newcastle | 36 | 7 | - | 13 | - | 16 | 40 | 57 | -17 | 34 |
| 18 | Hull | 36 | 8 | - | 10 | - | 18 | 38 | 62 | -24 | 34 |
| 19 | Middlesbr. | 36 | 7 | - | 10 | - | 19 | 56 | 54 | 2 | 31 |
| 20 | WBA | 36 | 8 | - | 7 | - | 21 | 36 | 65 | -29 | 31 |